gult cyan magenta svart



# Vesna fer til Tjaldur



*Vesna Tomajek er nú farin av landinum, men komandi kappingarár fer hon at royna seg hjá Tjaldri í Runavíki*

**Komandi kappingarár fer Vesna Tomajek, sum nú er farin aftur til Jugoslavia, at spæla við Tjaldri**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum kunnugt, hevur ársins hondbóltsleikari í kvinnudeildini, Vesna Tomajek, boðað frá, at hon ikki longur ætlar sær at spæla við Stjørnuni. Hetta hevur í eina tíð verið greitt, og leygardagin var seinasti dagur hennara her á landi í hesum umfari.

### Til Runavíkar

Tað var tó ikki fyri well, tá Vesna hesa ferð segði farvæl við Føroyar, tí komandi kappingarár verður hon aftur at síggja í kappingini. Tá verður tað tó ikki við Stjørnuni, at hon skal spæla, men hinvegin við Tjaldri í Runavíkini.

Sosialurin hevur fingið upplýst, at Tjaldur hevur gjørt sáttmála við Vesnu um, at hon komandi kappingarár skal verða høvuðsvenjari fyri alla ungdómsdeild felagsins. Í løtuni fevnir hendan um aldursbólkarnar upp til 14 ár, men ætlandi skal hetta so víðkast, soleiðis at felagið sum frálíður fær umboðan í øllum ungdómsdeildunum.

Tjaldur er jú eitt rættiliga nýtt felag, og ungdómsarbeiðið hevur at kalla ikki verið nakað í nógv ár inni í Runavíkini. Í fjør varð tó sjøtul settur á hetta, tá Sverri Jacobsen legði lunnarnar undir nýggja ungdómspolitikkin, og nú er so ætlanin, at Vesna Tomajek skal taka yvir í so máta.

Umframt at vera venjari, skal Vesna so eisini spæla við besta kvinnuliðnum í Runavík, og einki er at ivast í, at hetta verður ein risa stórur styrkur hjá botnliðnum at fáa.

Stóri spurningurin í so máta er helst, um tær megna at halda sessin í deildini, har tað fyrst og fremst er Sóljan, sum tær skulu sleppa uppum, um talan ikki skal vera um aðru deild komandi ár.

### Tóku kjansins

Úr Runavík frættist, at sambandið millum Tjaldur og Vesnu kom í lag, tá tað kom fram, at alt ikki ruggaði sum tað skuldi í Klaksvíkini. Skjótt frættist, at Vesna Tomajek hevði gjørt av at stinga í sekkin, og so gjørdu runavíkingarnir skjótt av. Tey settu seg í samband við Vesnu, og aðrenn langt var liðið, var alt komið í rættlag, soleiðis at Vesna komandi ár verður knýtt at Tjaldri.

Sum skilst á lagnum, eru tey í Runavíkini ógvuliga spent uppá, hvussu Vesna fer at roynast sum venjari hjá teimum. At hondbóltsevnini eru góð, er einki at ivast í, og umframt heiðurin sum ársins leikari, varð hon eisini kosin ársins venjari í fjør, og ivaleyst hevur hon nakað at læra frá sær til ungdómin.

Hetta er samstundis ein ásannan í Runavíkini av, at nóg mikið ikki hevur verið gjørt við yngru hondbóltsdeildirnar. Tað eru hóast alt hesar, sum skulu verða grundarlagið undir felagnum framyvir, eins og tey felagnum meta seg skylda stóra baklandinum, at eitt miðvíst arbeiði eisini verður gjørt á hesum økinum.

VB-Tjaldur 25-15 (11-8)

# Tjaldur kløkkaði VB

**Fyrra hálva tíman høvdu gestirnir stutt tjóður í heimaliðnum, men eftir fleiri útvísingar á rað, fall alt saman hjá botnliðinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var so avgjørt toppur og botnur, sum hittust, tá Tjaldur um vikuskiftið fór til Vágs at spæla móti besta kvinnuliðnum hjá VB.

Liðini hava alt ár verið at finna í hvør sínum enda, og innanhýsis úrslitini higartil høvdu eisini verið greiðar ábendingar um, at talan bert var um ein avgreiðsluspurning hjá VB.

### Javnt fyrra umfarið

Ivaleyst hevur stóri favorittleikluturin gjørt sítt, og í øllum førum var tað ein sannroynd, at VB í fyrra hálvleiki hevði stórar trupulleikar av gestunum. Bert trý mál skiltu partarnar, og gestirnir fóru spakuliga at halda, at tær møguliga kundu skapa eina sensatión av teimum heilt stóru.

At byrja við var heldur ikki talan um tann stóra munin í seinna hálvleiki, men brádliga vórðu tær á útiliðnum álvarsliga skerdar. Útvísingar fóru at hegla oman yvir tær, og hesum dugdu tær á heimaliðnum at gera sær dælt av. Betri gjørdist tað ikki, tá Beinta Joensen varð rikin av vølli fyri at brúka seg ov nógv, og tá so bæði Milica Ergic og Ann Mari Østerø høvdu fingið tríggjar útvísingar, gekk at kalla heilt galið. So illa stóð nú til, at eykamálverjin hjá Tjaldri mátti fáa sær ein vest, soleiðis at liðið kundi vera fullmannað seinastu løtuna.

Sostatt gjørdist talan eisini um væntaða stórsigurin til heimaliðið, tá avtornaði, men tær fingu í øllum førum eina ávaring um, at tað valla loysir seg at undirmeta nakran sum helst. Heldur ikki um talan er um eitt lið, sum ongan dyst hevur vunnið í hálvt annað ár.

Hetta var annars fyrsti dysturin, at Tjaldur heðvi jugoslavisku Jelena Jevtic við á liðnum. Sum skilst, fekk hon ikki tað stóra burtur úr dystinum, men hinvegin man tað enn vera nakað tíðliga at meta um, hvussu hon fer at roynast fyri botnliðið.

### Illa nøgdar um dømingina

Eftir dystin fingu vit orðið á Beintu Joensen, ið sum nevnt varð rikin av vøllinum, og sum vera man var hon sera hørm um hendingina, sum kostaði henni reyða kortið. Ikki minst, tí tað so avgjørt ikki var úr hennara munni, at orðini komu, sum fingu dómararnar at taka reyða kortið fram.

– Eg má siga, at hetta følist heilt ræðuligt. Eg havi ongantíð í øll tey árini, sum eg havi spælt, fingið leikbann, Nú noyðist eg at sita yvir, og ikki minst er tað keðiligt, tí eg als ikki skuldi fingið reyða kortið.

– Tað hendi soleiðis, at eg hevði júst fingið tveina útvísing. Meðan eg so sat á beinkinum, fór ein hending fram úti á vøllinum, sum fekk eina aðra á okkara liðið at senda eina viðmerkingar eftir dómarunum. Úrslitið av hesum var, at eg varð revsað fyri hetta, og tað eri eg sjálvandi sera hørm um, segði Beinta um hendingina, har hon fekk reyða kortið.

Annars var Beinta av teirri áskoðan, at nógvu útvísingarnar, sum Tjaldur fekk í seinna hálvleiki, oyðiløgur dystin fyri teirra viðkomandi.

– Eg haldi so avgjørt ikki, at vit spældu somikið hart og ófantaligt, at tað varð neyðugt við øllum hasum útvísingunum, sum vit fingu í seinna hálvleiki. Fram til tað, høvdu vit sum so spælt ein fínan dyst, og eg haldi eisini, at vit fingu loypt ein ordans hvøkk á VB, sum als ikki tóktust uppsettar, tá dysturin byrjaði. Møguleikin hjá okkum fór so avgjørt fyri skeyti av hesum, og tað er sjálvandi keðiligt hjá okkum.

Við ósigrinum er Tjaldur framvegis á niðasta sessi, har tær enn eiga fyrsta sigurin til góðar, meðan VB hinvegin framvegis heldur fast í Stjørnuni í dystinum um silvurmerkini. Gullmerkini kunnu sjálvsagt røkkast enn, men hetta krevur so hjálp frá øðrum liðum, og í øllum førum skal annað spæl finnast fram, um sigrar framhaldandi skulu koma móti ovaru liðunum í deildini.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VB: Christina Ho,m 9(1), Andrea Lütz 5(2), Regina Radó 3, Gurið Mortensen 3, Mary Krosslá 2, Margretha Augustinussen 2, Eyðbritt Krosslá 1
Tjaldur: Beinta Joensen 3(1), Kristine Ellingsgaard 3(1), Milica Ergic 2, Jelena Jevtic 2, Mona Langgaard 2, Turið Lamhauge 2, Oddvá Fossdalsá 1
Brotskøst: VB 4, Tjaldur 3
Útvísingar: VB 2, Tjaldur 11
Diskvalifikatiónir: Tjaldur 3 (1 beinleiðis reytt og 2 fyri 3X2 minuttir)
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen



*VB kvinnurnar fingu ein hvøkk í fyrra hálvleiki, men tær megnaðu tó at fáa væntaða trygga sigurin til høldar, tá avtornaði*

*savnsmynd*



StÍF-Kyndil 28-24 (12-10)

# Strandingar á silvurkós



*Seinna umfarið var kyndilsverjan als ikki nóg væl skipað, og fleiri ferðir spældu strandingar seg inn til gapandi stór hol millum verjuspælararnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kyndil megnaði bert í pørtum av dsytunum at halda heimaliðnum í tjóðri, og nú tykist nærum greitt, at tað verða strandingar, sum fara avstað við silvumerkjunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað líktist mest av øllum eini uppgerð um silvurmerkini, longu áðrenn dysturin byrjaði.

Gullmerkini hava satt at siga ikki verið nakar spurningur kappingarárið á tamb, og meðan vestmenningar í stórum stíli eru komnir alsamt nærri gullmerkjunum, hevur silvurdysturin alla tíðina staðið ímillum StÍF og Kyndil.

Avrikini hjá havnarmonnunum hava tó ikki verið serliga sannførandi síðani vetrarsteðgin, og tískil var tað eisini tvingandi neyðugt hjá teimum at vinna dystin á Skála, um strandingar ikki skuldu sleppa leysir av Kyndli.

Fyrstu løtuna av dystinum var heldur ikki líkt til, at Kyndil ætlaði at lova vertunum nakað sum helst. Teir løgdu stóran dent á verjupartin, har teir við kontantum og til tíðir hørðum spæli gjørdu sítt til, at uppgávan hjá Jens í málinum gjørdist eitt sindur lættari, enn hon hevur verið fleiri av seinastu dystunum.

Yvir høvur var kyndilsavrikið sera sannførandi hesa fyrstu løtuna. Verjuparturin riggaði væl, og við útgangsstøði í hesum fingu teir fleiri ferðir sett mótálop í gongd, soleiðis at menn sluppu leysir við Johan í StÍF málinum.

### Steðgaðu upp

Góða gongdin hjá Kyndli helt sær í einar tíggju minuttir, og størsta einstaka orsøkin til, at alt nú koppaði hinvegin, mundi vera Costin Dumitrescu. Fyrstu løtuna av dystinum hevði hann hildið seg á beinkinum, haðani hann royndi at stýra sínum monnum, men tað var tó greitt, at her máttu evni hansara sum hondbóltsleikari eisini koma upp í part.

Hetta setti beinan vegin meira ferð á álopsspælið, men tað var serliga í verjupartinum, at StÍF nú fekk fatur á Kyndli. Seinastu 20 minuttirnar undan steðginum skoraði Kyndil bert trý mál (harav tvey brots køst), og strandingar fóru tí spakuliga upp á javnt, og síðani fram um gestirnar.

### StÍF hevði tak á

Ringi endin upp á fyrra hálvleik, sat helst eisini onku staðni í heysinum á kyndilsmonnum, tá teir fóru undir seinna umfarið. Nærlagni teirra í verjupartinum var als ikki eins stórt longur, og fleiri ferðir sóust StÍF álop endað við eini fríspæling í gapandi stóru holini í kyndilsverjuni.

Í álopspartinum gekst tó betri hjá Kyndli nú, og teir megnaðu eisini stóran part av tíðni at fylgja við strandingum í málskjóting, men kortini var tað ikki líkt til, at teir skuldu venda dystinum til egnan fyrimun. Tú sat alla tíðina við kensluni av, at StÍF hevði tamarhald á tí mesta, sum fyrifórst úti á vøllinum, og líka mikið hvussu Kyndil royndi, so kom munurin ikki niður um tvey mál.

Strandingar gjørdu sær rættiliga dælt, tá Kyndil seint í hálvleikinum varð rakt av eini útvísing, og eftir at teir høvdu økt upp í fimm mál, var spurningurin bert, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Kyndil royndi seinastu løtuna at mansverja bæði Artur og Costin, aum báðir høvdu verið sera sjónligir í spælinum, men hetta gav so aftur meira pláss til liðfelagar teirra. Sostatt kundi tað seinastu minuttirnar gera tað sama, at Bjarni veruliga hevði grivið kanónina fram, og millum annað lat nøkur súsandi undirhondsskot fara í StÍF meskarrnar.

### Hyggja aftureftir

Við sigrinum syrgdu strandingar fyri, at tað nú skal meira enn bert eitt tap í útidystinum móti Kyndli til tess at silvurmerkini skulu koma í vanda. Gullmerkini eru sjálvsagt ein møguleiki enn, men tað er helst bert ein spurningur um tíð, áðrenn vestmenningar læsa allar dyr í so máta.

Hjá Kyndli tykist alt nú at vera fallið í fátt, eftir at liðið annars undan jólasteðginum gjørdi rættiliga um seg. Mett varð tá, at Kyndil kanska sýndi vakrasta hondbóltsspælið í landinum, men hetta er so als ikki komið ferð síðani steðgin.

Stigamissir móti KÍF eru heldur ikki tað, sum styrkja mest um vónirnar fyri metallum, og satt at siga, so skal Kyndil heldur ansa eftir, hvør er í hølunum á teimum. Har hevur yngra havnarliðið bert eitt stig at geva av niður til skjótt 70 ára gomlu grannarnar.

Finna kyndilsmenn spælið frá í heyst fram aftur, er helst eingin vandi fyri at missa nakað sum, men spurningurin er helst, um tað er gjørligt at fáa sama vilja fram aftur í leikararnar. Tá stríddust teir fyri hvønn bólt, og viljin til at vinna lýsti úr leikarunum. Sunnudagin var hesin sami vilji bert at hóma fyrstu løtuna, og eftir at strandingar høvdu lagt seg framum, var viljin burtur.

Sinniliga yvirskotið tóktist heldur ikki vera eins stórt, og tað hjá mótstøðuni, og m.a. sóust kyndilsmenn ofta illneitast á hvønn annan, dómarar ella mótstøðumenn, heldur enn at royna at stuðla uppundir hvønn annan.

Hetta seinastu dugdu teir á heimaliðnum, og sum spælið er í løtuni verður eingin sum tekur teir av silvurplássinum. Teir megnaðu óvæntað at koppa VÍF í steypafinaluni, men hetta letur seg neyvan gera í landskappingini. Hinvegin man árið ikki hava verið heilt miseydnaði, um talan verður um eitt gull- og eitt silvurmerki, tá avtornar.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
StÍF: Costin Dumitrescu 7(1), John Petersen 7(2), Kristjan Petursson 6, Bent Djurhuus 2, Alexndur Johansen 2, Artur Johansen 2, Marius Joensen 2
Kyndil: Bjarni Wardum 8(2), Heini Bendtsen 4, Uni Wardum 2(2), Janus Einar Sørensen 2, Høgni Klein 2, Hans Áki Dahl Christiansen 2, Jónleif Sólsker 2, Hanus Jensen 1, Regin M. Petersen 1
Brotskøst: StÍF 5, Kyndil 4
Útvísingar: Kyndil 2
Dómarar úr Stjørnuni: Geir Wardum og Carsten Andersen. Framdu sjálvandi eisini síni mistøk ígjøgnum dystin, men tó alla tíðina tamarhald á tí, sum fyrifórst, og ongan tíð var dysturin um at gleppa teimum av hondum.



*Costin Dumitrescu helt sær á beinkinum fyrsta partinm av dystinum, og tað var heldur ikki fyrr enn hann kom innn, at StÍF vann sær yvirtakið í dystinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*